## Daewoo tvífalda útflutningin



Koreanska Daewoo bilverksmiðjan tvífaldar útflutningin til 250.000 bilar í ár. Komandi ár verður útflutningurin 400.000 bilar. Eftir ein steðg byrjar sølan nú aftur í USA og Canada

*Kelda: Motor Magasinet*

## VW í Ukraina



VW konsernin hevur tikið avgerð um at byrja at framleiða bilar í Ukraina. Talan verður um Polo, Golf, Bora og Passat.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fiat og GM



Í juni leggur italska Fiat bilverksmiðjan fram eina saneringsætlan í samstarvi við General Motors. Upplýsingarnar eru frá Fiat forsetanum Umberto Agnelli.

*Kelda: Motor Magasinet*



*Agnar Dahl og Sofus Jacobsen til road racing í Fraklandi á páskum*

# Road Racing verður í Vestmanna

**Á páskum vóru fimm føroyingar frá motorsúkklufelagnum "Føroya MC" á venjing í Road Racing motorsúkklukoyring í Fraklandi. Sum nakað nýtt verður skipað fyri líknandi koyring í Vestmanna leygardagin 24. mai**

ROAD RACING
*Magnus Gunnarsson*

Tað er stór tilgongd innan koyring við motorsúkklum í Føroyum. Umframt áhugafelagið Føroya Ellisakfør, har limirnir hava bæði bilar og motorsúkklur, er eisini felagið Føroya MC, har teir flestu av teimum umleið150 limunum hava motorsúkklur. Á páskum vóru fimm føroyingar úr Føroya MC í Fraklandi á venjing í Road Racing motorsúkklukoyring, teir vóru: Hans Magni Danielsen, Torbjørn Hansen, Sofus Jacobsen, Agnar Dahl og Torkil Hansen. Road Racing er kappkoyring á motorsúkklum á rasarabana, har kappast verður í ymiskum flokkum, alt eftir motorstødd (ccm). Koyringin í Fraklandi varð deild upp í fýra klassar, gøtukoyrarar og tríggir licensklassar, sum vóru býttir upp eftir ferð. (licens-koyrarar, skjótir licenskoyrar og heilt skjótir licenskoyrarar.) Av føroyingunum koyrdu Torbjørn Hansen og Hans Magni Danielsen millum gøtu-koyrararnar, hinir byrjaðu allir millum licenskoyrararnar. Eftir fyrsta dagin vórðu Sofus Jacobsen og Agnar Dahl fluttir upp í kvikar-licenskoyrarar. Sigast má, at úrslitini vóru góð fyri teir tríggjar licenskoyrararnar. Í teirra motorstødd (125 ccm) blivu teir nr. 2, 3 og 4. Road Racing er ein kappkoyring á motorsúkklum á rasarabana, har kappast verður í ymiskum flokkum, alt eftir motorstødd (ccm)). Alt skuldi góðkennast, motorsúkklurnar og førararnir, klæðini teir vóru í o.s.fr.. Eisini trygdin var í lagi, læknar og sjúkrabilar vóru til reiðar, um nakað skuldi hent. Føroyingarnir vóru so væl nøgdir við venjingina í Fraklandi, at teir nú fara at skipa fyri Road Racing motorsúkklukoyring í Føroyum.



*Føroyingarnir høvdu eina garasju til smærri umvælingar og at goyma súkklurnar í*

Leygardagin 24. mai verður bátastevna í Vestmanna. Í hesum sambandi hevur VÍF skipað fyri, at Road Racing verður á kaiøkinum í Vestmanna hendan dagin. Koyrt verður við 50 ccm motorsúkklum. Allar motorsúkklurnar skulu vera í forsvarligum standi, og tey sum koyra súkklurnar skulu vera í heildekkandi leðurdrakt, leðurhandskum og góðkendum hjálmi og stivlum.

Hetta er fyrstu ferð, at slík kapping verður fyriskipað í Føroyum. Síðani Føroya-MC bleiv stovnað í 2000, hava limir roynt at fingið eitt øki til vega, har Road Racing kundi koyrast, men tað hevur ikki verið møguligt at fingið játtað loyvi at koyra á onkrum avbyrgdum øki - hvørki frá myndugleikum ella privatum persónum/virkjum.

Fyrireikararnir og limirnir hjá Føroya-MC eru sjálvsagt fegnir um, at VÍF nú hava gjørt tað møguligt at koyra í Vestmanna, og vónandi verður hetta ikki síðstu ferð, at Road Racing verður í Føroyum.

Torkil, Agnar og Sofus hava eisini roynt at koyra Road Racing í Danmark, har teir hava verið við í DM í 125 ccm standard. Torkil og Agnar luttóku í 2001, og tá endaði Agnar samanlagt á einum 7. plássi, hóast tað ikki var møguligt at luttaka til allar kappingarnar. Sofus luttók í 2002 og endaði tá á einum 6. plássi.

Tilmelding til Road Racing í Vestmanna í seinasta lagi mikudagin 21. mai hjá AD-Import,
teldupostur:
ad-import@ad-import.fo ella á tel. 320213 millum kl. 10-17. Her fæst eisini nærri upplýsing.






*Føroyskir luttakarar vóru við í kappingini*

# ítróttur

Nr. 92 • hósdagur • 15. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hagtølini bíða

Sum áður sagt ber verkfallið við sær, at plássið í blaðnum er avmarkað – eisini á ítróttarsíðunum. Tí verður tilfarið um landsliðshagtøl, sum vit í síðstu viku søgdu fór at verða í blaðnum í hesi vikuni, ikki við í hesi vikuni. Vit vóna, at tað verður rúm fyri tí í næstu viku.

# GÍ og KÍ eru í øðini inn á FSF

**Fyri at øll feløgini í hálvfinaluni í steypakappingini skulu vera eins fyri, hevur kappingarstjórin flutt dystin, sum skuldi vera í Gøtu í kvøld, til í morgin. Tað eru GÍ og KÍ alt annað enn fegin um**

GÍ–KÍ
*Jóannes Hansen*

Sambært skránni skuldi fyrsti landskappingardysturin í fyrsta umfarinum í 1. deild verið spældur í Gøtu í kvøld. Hann skuldi havt verið millum GÍ og KÍ. Nú hevur kappingarstjórin gjørt av at flyta dystin til í morgin, og tað eru bæði KÍ og GÍ so hørm um, at tey í mótmælisskrivi til nevndina í FSF hava biðið um, at avgerðin hjá kappingarstjóranum verður kolldømd. Í mótmælisskrivinum, sum er til skjals á heimasíðuni hjá GÍ, verður sagt, at feløgini ætla sær at spæla dystin í kvøld klokkan 18.30, sum tað hevur verið avrátt.

Starvsnevndin í FSF skuldi hava fund seinnapartin í gjár. Tí var ikki greitt, hvørja støðu starvsnevndin fór at taka, tá ið blaðið fór til prentingar. Lesararnir mugu tískil aðrar vegir kunna seg um, um nú dysturin í Gøtu verður í kvøld, ella um hann verður spældur í morgin.

Feløgini eru ikki fegin um, at tey hava verið so illa kunnað í viðgerðini av flytingini – bæði frammanundan og eftir at avgerðin er tikin. Tey halda ikki, at tað er rætt, at tey skulu lesa um hetta á heimasíðuni hjá FSF, og tey undrast á, at kappingarstjórin hevur tosað við fleiri onnur feløg um spurningin, uttan at tey eru sett inn í málið. Eitt nú hevur samband verið við B36 fyri at fáa teir at vera við til at framskunda dystin í Vági, sum sambærst skránni skal spælast í morgin, til í kvøld. Tá ið tað ikki eydnaðist at framskunda tann dystin, er avgerð tikin um, at dysturin í Gøtu skal útsetast Tað halda GÍ og KÍ vera burturvið í kæruni, sum er undirskrivað av formonnunum báðum – Jógvani Gregersen í GÍ og Gesti Hovgaard í KÍ.

### Ein kiksari

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, staðfestir, at dysturin í Gøtu er útsettur til í morgin, tí tað verður ikki mett at vera rætt, at tey fýra feløgini í hálvfinaluni sunnudagin ikki fáa somu hvíldina. Tað høvdu tey ikki havt møguleika fyri, um GÍ og KÍ spældu í kvøld, og um B36 skuldi spælt í Vági og NSÍ á heimavølli ímóti NSÍ í morgin. Í seinnu hálvfinalunum sunnudagin skal B36 spæla á útivølli ímóti KÍ, meðan GÍ skal spæla á heimavølli ímóti NSÍ.

– At tað í skipanini er ásett, at GÍ og KÍ skulu spæla í kvøld, er eitt mistak. Eysturoyarfeløgini løgdu í vetur uppskot fyri FSF um, at ein dystur í hvørjum umfarinum skuldi spælast leygardag í Eysturoy, har helmingurin av feløgunum í 1. deild hoyrir heima. Hetta metti FSF at vera skilagott uppskot, og so varð skráin broytt. Men í fyrsta umfarinum áttu vit ikki at havt flutt dystin fram til hóskvøld, tí tá vistu vit longu, at seinnu hálvfinalurnar vóru á skránni sunnudagin eftir, og at tað tískil var góður møguleiki fyri, at GÍ ella KÍ ella bæði liðini fóru at verða partur av hálvfinaluni.

Feløgini halda, at kunningarstøðið í sambandi við viðgerðina og avgerðina ikki hevur verið, sum tað eigur at vera?

– Eg kunnaði munnliga GÍ um ætlanina mánamorgunin, men tað er rætt, at KÍ ikki fekk beinleiðs boð, áðrenn avgerðin varð tikin, og at kunningin ikki hevur verið í lagi, tíverri. Orsøkin er tann, at vit liggja undir í arbeiði júst nú, og at feria og sjúka bóru við sær, at vit vóru serliga illa mannað á skrivstovuni fyrrapartin av vikuni. Hetta harmar okkum. Men vit halda framvegis, at tað ítróttarliga er best, at øll liðini í seinnu hálvfinaluni verða eins væl fyri.

Men ber tað til hjá FSF at flyta ein dyst, uttan at feløgini eru spurd um tað?

– Í ásetingunum verður sagt, at um feløgini vilja flyta dyst, so skulu tey verða samd um tað, áðrenn tey seta seg í samband við FSF. Í hesum førinum eru tað ikki feløgini, sum vilja flyta ein dyst. Tað er kappingarstjórin, sum flytir dystin fyri at rætta eitt mistak, sum FSF hevur gjørt. Vit sleppa ikki undan mistøkum, og tað er altíð best, at mistøkini verða rættað. At feløgini eru rísin um kunningina, skilji eg væl, men tað kann ikki forða fyri, at tað verður gjørt, sum er rættast, segði Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, áðrenn hann fór til fundar saman við FSF nevndini í gjár.



## Bilpakkar Summarsiglingin 2003

**Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.980 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

**Tórshavn - Bergen ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

**Tórshavn - Lerwick ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

**Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.660 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo